# Har vóru fólk heilt til Himmals



*»Tað var ótrúliga flott at síggja, tá eg traðkaði út á pallin, og sá fulla salin«, sigur Eivør Pálsdóttir*

**Eivør helt tað vera fantastisk, at traðka út á pallin og síggja nógva fólkið í salinum og á teimum fyltu balkongunum, sum gingu heilt upp til Himmals**

KONSERT Í OPERAHÚSINUM

Eivør er sum altíð blíð, tá eg hitti hana aftan fyri pallin aftan á konsertina. Okkurt skilfólk, sjeikurin og umboðskonan eru í skiftingarrúminum, og so Eivør og eg. Hon leggur fyri við siga, at hetta hevur ikki verið hennara besta konsert, og at tónleikaliga vóru konsertirnar í Føroyum betur.

### Krevur størri rørslir

Men tað sagt, heldur hon, tað vera ótrúliga stuttligt at uppliva hesar karmarnar. "Tað var ótrúliga flott at síggja, tá eg traðkaði út á pallin, og sá fulla salin. Har sá út, sum um har vóru fólk heilt til Himmals. " greiddi hon frá. "Tað er altíð avbjóðandi at spæla fyri so nógvum fólki, eg vil ikki siga, at eg beinleiðis var nervøs, men man følir, at man skal røkka fleiri, og tað krevur størri rørslir. Men tá hjálpir tað sjálvandi at hava eitt Big Band aftan fyri seg. Nógva orkan, sum er á pallinum, gevur nógv, og ger tað ordiliga stuttligt."

### Løgið ljóð

Hon sigur frá, at hon heldur hølini vera ótrúliga flott, "Ljósið var soleiðis, at man sá áskoðararnar rættuliga væl, og tað er stuttligt. Ljóðið tyktist eisini at vera øgiligt gott í salinum, og eg veit, at ljóðmaðurin har úti var ordiliga góður, men á pallinum kundi tað verið betur. Tað var eitt sindur løgið ljóð, men tað gekk" sigur hon.

"Tað er altíð annarleiðis at spæla fyri fólki, ið ikki kenna tónleikin, og man merkir tað beinanvegin, tá man kemur á pallin, ikki annarleiðis á nakran ringan hátt, faktiskt uppá ein góðan hátt".

### Ikki síðsta konsert

Hetta var fyribils endin á konsertferðini við Danmarks Radios Big Band, og Eivør heldur hetta hava verið eitt stuttligt samstarv. "Man verður ordiliga forkelaður" fólk eru, sum taka sær av øllum , og man skal bara hugsa um at spæla." Hon væntar, at onkur konsert verður við Big Bandinum seinni. Sigvør umboðskonan sigur, at ein longu er avtalað, so hetta er ikki síðstu ferð, at hetta samstarv er á palli saman.

### Danski marknaðurin

Eivør leggur ikki skjól á, at hon er í ferð við at royna seg á danska marknaðinum og fortelur, at hon í februar fer á størri konsertferð í Danmark. Eingin ivi er um, at konsertferðin og fløgan við Danmark Radios Big Band hava lagt eitt gott støði fyri at klára seg væl á hesum marknaði.

# So ófatilig

**Karmar, tónleikur, songkvinnur og áskoðarar gjørdu konsertina í Operahúsinum í Keypmannahavn mánakvøldið til eina so ófatiliga vakra uppliving**

KONSERT Í OPERAHÚSINUM

*Orð: Niels Uni Dam,*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

Eivør og Caroline Henderson fyltu stásiligu operahúsini í Keypmannahavn, tá tær mánakvøldið bjóðaðu innar til jazzkonsert. Konsertin, ið vardi tríggjar tímar, var ein stór tónlistarlig uppliving.

Tað var Copenhagen Jazzhouse, ið lánti Operahúsið hetta kvøldið, tí sum frásøgumaðurin segði, tá hann bjóðaði vælkomnum, summar konsertir krevja størri karmar. Hetta hevur hann rætt í, og torført er at ímynda sær stórslignari karmar enn júst operahúsið.

### Gásarhold, ið heldur

Hóast Big Band tónleikur ofta kann vera eitt sindur easy listening kendur, so var tað ikki hetta, sum merkti konsertina í operahúsinum. Teir nógvu áskoðararnir vóru mettir og móðir, tá dyrnar til operahúsið lótu upp aftur.

Tvær av teimum heilt góðu sangarindunum í danska kongaríkinum høvdu staðið á pallinum, og aftan fyri seg høvdu tær hvør í sínum lagi tveir av bestu bólkunum innan fyri hvørt sítt økið í sama kongaríki, og so í slíkum kørmunum. Tá eg skrivi hetta 12 tímar eftir, at konsertin var av, er enn eitt sløð av gásarholdinum eftir. Tí hóast gásarholdið bert veruliga gjørdi um seg í einum lagi alt kvøldið, so var hetta so ógvusligt, at bara tankin um "Nú brennur tú í mær" gevur gásarhold um allan kroppin.





### So vakurt

Húsini eru stórsligin, ein fullur salur og tríggjar hæddir av balkongum, í allar hava trý røð av setrum, eru tilsamans eitt hav av fólki, sjálvt royndа sangkvinnan Caroline Henderson, sum hevur spælt konsertir seinastu 20 árini, segði heilt spontant í mikrofonina "Hold da op, hvor er her smukt", og tað var júst vakurleiki, sum eyðkendi hesa konsertupplivingina, vakur tónleikur og vakrar kvinnur í fantastiska vøkrum karmum. Ljósið var vakurt, serliga tann stóri ljósmyndaveggurin aftan fyri pallin og ja, áskoðararnir høvdu pyntað

# Made in Europe

**Caroline Henderson spældi við standard jazzin, men fekk ikki veruliga veingir fyrr enn poppurin slapp á skránna, og við lagnum "Made in Europe" bergtók hon áhoyrararnar**

KONSERT Í OPERAHÚSINUM

Caroline Henderson legði fyri. Danska sangarindan við svenskari mammu, uppvøkstri í New York, London og Paris og tónlistarligum støði í popduo'ini Ray-Dee-Ohh, var heitasta danska poppnavnið í 1995, tá frálíka lagið "Made in Europe" hittaði stórt í Danmark. Fløgan Cinemataztic, ið var løgd til rættis av frálíku Kasper Winding og Thomas Blachmann vann sjey virðislønir á Danish Music Awards, og seldi eitt ótal av eintøkum. Síðan trip hop kenda poppin á Cinemataztic hevur Caroline leita tónlistarliga, tó uttan veruliga at gera um seg. Tær báðar seinastu fløgurnar hava verið reinar jazzfløgur, og ummælarar hava elska tær, tó uttan at tann breiða áhoyrarafjøldin hevur tikið tær til sín.

### Kresten Osgod í hvítari T-shirt

Tað var eisini jazzurin, ið merkti konsertina hjá Henderson í Operahúsinum. Í svørtum strømmum kjóla, Whitney Houston hári og skóm við stórum reyðum sloyfum á, líktist hon eini diva, og á onkran hátt klæddi hetta slettis ikki annars so vøkru Caroline. Við sær hevði hon ein jazzbólk í heimsflokki, har serliga tann fantastiski trummuleikarin Kresten Osgod skaraði framúr.

Kresten Osgod, ið plagar at vera gestur á konsertum hjá Teiti, var í fyrstu helvt av konsertini heldur enn Caroline frontmaður í bólkinum. Hann var frísuttur og farin í hvíta t-shirt, meðan restin øll vóru svørtklødd, hansara kropsmál var ógvusligt, og hann spældi so markant, at Caroline